# Nøvn

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður mín, sonur, beiggi, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Levi Christiansen**
**Tórshavn**

andaðist í Stavanger týsdagin 18. januar, 63 ára gamal.

Jarðarferðin verður mánadagin 24. Januar kl. 14.00 úr Evangeliihúsinum.

**Eyðvør og børn við familjum**



## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá høgt elskaði maður mín, pápi, verfaðir, abbi, langabbi og beiggi okkara

**Justi Poulsen**
**Tórshavn**

andaðist og var jarðaður.

Tøkk til Dánjal á Dul Jacobsen og Hera Joensen fyri troystarrík orð. Tøkk til Teodor Petersen fyri vakran sang og Oddbjørg Poulsen fyri undirspæl. Takk til berarar, sangarar, kirkjutænarar og gravarar.

Takk til tykkum, sum bakaðu, og til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðina og ervinum. Tøkk til tykkum, sum ringdu, góvu blómurm, krans, pengingagávur til Hjálpina og til tykkum mongu, sum vitjaðu og fylgdu Justa til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Irena, Sofus, Birthe, Guttorm, Esther og Heidi**

# Ingeborg hjá Julius



Vit livdu í eini broytingartíð. Postbáturin Immanuel hevði fingið avloysara og gamli Pride eisini. Tankarnir fara aftur til 1963, tá húsini "á Heygum" í Svíni vórðu umbygd og tikin í brúk. Másin sigldi enn av Klaksvík norður gjøgnum Haraldsund, fór um Múlan og suður ígjøgnum Hvannasund. Her slongdust vit millum petroleumsdunkar og mjólkardunkar, livandi kálvar, timbur og máling, barnavognar og annan farm. Hetta tók sína tíð. Viðraði ikki á Svínoyareiði, varð lagt suður um, og lítil tími lagdur aftrat siglingini. Spýggjubakkarnir vórðu mangan dúgliga brúktir. Men hevði tú fingið føturnar upp á land, var alt í lagi, tí altíð tók Ingeborg ímóti okkum, henda hendinga konan, henda sermerkta, blíða Ingeborg hjá Julius. Til hennara fóru vit altíð fyrst eftir lyklunum til húsini uppi "á Heygum".

Ingeborg varð fødd suðuri í Vági í januar 1917. Árið fyri, hon var fødd, kom fyrsti millumbygdavegur í Føroyum. Tað var millum Sand og Skopun !

Frammi í Garði kallast tað, har Ingeborg í 1945 giftist inn í barnaheimið hjá manninum Julius, ið var svínoyingur. Inni hjá henni var alt, - hiti, umsorgan, heimabakað breyð og blíðskapur. Hetta er áðrenn SEV tendrar streymin í oynni. Petroleumslampurnar hjá Ingeborg minnist eg so skínandi blankar, bæði lampugløs og messing. Og lampulogin skein so fagurliga. Torvroykurin fylti okkum við nærveru og vælveru - tekoppurin varð skoldaður, áðrenn hon skonkti. Tað reyk so lystiliga, tá hesin tómi, sjóverkligi búkurin fekk nakað styrkjandi frá hesi gudgivnu Ingeborg. Og heilsanin: vælgagnist "tygon" á góðum suðuroyarmáli, fylgdi okkum niðan "á Heygar", har Ingeborg hevði gjørt alt klárt, til vit komu. Tú vart bara so serlig, so heilt ótrúliga sterk og beinasom.

Fari aftur um tað farna, sum kom aftur. Byrjanin til alt var sambandið millum Óla Hans Hans – Petersen, verpápa Ingeborg og abba okkara í Klaksvík, Jógvan Fr. Joensen, seinni Kjølbro. Teir báðir vórðu knýttir at handlinum úti í Klaksvík. Óli Hans var nakað eldri enn Jógvan hjá Ole Klokker, men sambandið teirra millum kastaði av sær, ja, frá á leið ár 1903 og so gott sum fram til dagin í dag !

Væl bar til at viðlíkahalda sambandið. Úthandil í Svíni og skyldskapur av Syðradali K umframt framskygni er eitt gott boð uppá samanhaldið. Eitt ferðingarmynstur tók seg upp. Børn í Klaksvík hjá Karini og Jógvan ferðast í Svíni, og børnini hjá Óla Hans ferðaðust í Klaksvík. Og vit flyta okkum skjótt, tá henda mynduga, hávaksna gentan sunnan úr Vági kemur til Svínoyar at taka eina hond í hjá Anniku Justinussen, ið so blaðung gjørdist einkja við trimum smádreingjum.

Skjótt hendir tað úti á hesi fjarskotnu útoyggj, at tað dregur saman millum suðuroyargentuna Ingeborg Vilhelm og Julius. Hann var hin seinasti eftir í oynni av systkjunum, hini vóru øll farin til Klaksvíkar. Teirra tilhald var á Biskupsstøð hjá ommu og abba, og systirin, vanliga nevnd Ebba, tænti har í nøkur ár.

Hetta hevur verið ein fongur "Frammi í Garði", tí verdóttirin var eitt arbeiðsgrev. Ingeborg var myndug, trúføst og stýrdi húsarhaldinum við so fínligari atferð, at vit norðingar løgdu tað til merkis. Hon dugdi bara alt ! Myndugleikin skein av henni, - hon var so gløgg, kendi fagrar bókmentir langt út um landoddarnar og legði aftrat sína lívsáskoðan. Fyndug og beinrakin gav hon til kennar, hvat hon helt um tað, ið frammi var í samfelagnum. Ingeborg og Julius fingu fimm børn, Óluvu, Katrin og John, ið eru tvíburðar og Annu og Mary, somuleiðis tvíburðar. Síni bestu ár passaði hon handilin, kúgv og seyð. Í bønum syrgdi hon fyri, at hoyggið kom til høldar, og burtur í torvi sóu vit hana mangan fara so vandaliga um. Sjálvandi hjálpti Julius til, tá hann ikki var til skips.

At Ingeborg var álitið hjá okkum úti í Svíni, kemst ikki uttanum. Hon hevði tað neyva við í øllum.

Gloymi ikki, tá systkinabarnið hjá pápa okkara, Hans Biskopstø Andersen var í Føroyum og ferðaðist, og pápi okkara og hann uppi á Heygum málaðu hvør sín oljumálning av bygdini. Tann hjá Hans var dramatiskur, djúpur og litríkur, - tann hjá pápa lítil og eygmerktur. Hans var listarmaður burturav, pápi meira kravlítil. Málningurin hjá Hans fór til Klaksvíkar at hanga. Men myndin, pápi málaði, var sermerkt, litrík og neyv! Tá pápi varnaðist, at Ingeborg var hugtikin av myndini, ið hon kundi sita leingi og eygleiða, ivaðist hann ikki. Hon skuldi eiga hann. Ingeborg gav málninginum eitt heiðurspláss í góðu stovu "Frammi í Garði", og har hongur hann enn.

Í mong, mong ár vóru Ingeborg og Julius Gaard bindiliðið millum okkum og húsini á Heygum. Tær tænastur, tit gjørdu okkum, vóru ómissandi. Ivist, um tað hevði borið til uttan tykkum, tí Svínoy var tá eins og nú, fjarskotin, hóast tunnlarnir norður um Fjall gjørdu tað í ein vissan mun lættari. Sambandið til Klaksvíkar hildu Ingeborg og Julius væl. Vit hittust til serlig høvi, og í mong ár var

Ingeborg gestur hjá okkum jóladag, tá hon var vorðin einkja.

Tað vildu so til, at Julius og pápi okkara fóru í sama ári – í 1977. Ingeborg gjørdist tá meira og minni klaksvíkingur. Vetrarnir gjørdust ov einsligir, so teir helt hon til hjá dóttrini í Klaksvík. Nú hon júst hevði nátt sínum 94. ári, sleptu hesar troyttu hendur. Seinastu árini var hon á Norðoya Vistar – og Røktarheimi.

Góða Ingeborg ! Av tínum slag finnast so fá. Tú dugdi bara at fáa alt at bera til, - tókst ímóti okkum, ið komu út í oynna, skúlaflokkum úr Klaksvík, Kalsoynni og Havn. Barst teg ongantíð undan um vit vóru nógv ella fá, stór ella smá. Vit høvdu eisini respekt fyri tær og vistu, at tá vit ungu høvdu verið á Heygum og høvdu borið lykilin inn aftur til tín, var umráðandi, at væl varð gingið um, tí annars fórt tú at tala at næstu ferð, vit komu.

Við tær er ein merkistíð farin afturum. Tú litaði og myndaði sumrini úti í Svíni, sum liggur í minninum sum eitt blítt afturskin.

Vit lýsa frið yvir merkiskvinnuna Ingeborg Gaard.

**Poulina Slættanes**